**10. jan. 2020 AK[1]/JM**

# Kunning um verkætlanir játtaðar av Fiskivinnuroyndum 2020

## Alment:

Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.
Nýtt 4-ára programm varð gjørt fyri 2017-20, har serligur dentur aftur varð lagdur á somu 3 høvuðsøkini sum frammanundan, men ymisk nýggj undirpunktir komu afturat í 2017, sum meira áherðsla varð løgd á. Programmið 2017-20 við øllum undirpunktum sæst á síðu 10 í hesari kunningini. Væntandi verður nýtt programm gjørt fyri tíðarskeiðið 2021-24 í ár.
Broytingarnar, sum vórðu gjørdar í 2017, eru vístar við gulum á s. 10. Høvuðsøkini eru hesi:

1. **Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar
2. **Burðardyggur fiskiskapur**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar
3. **Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum**
   Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggjast afturat vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum.

## Játtanir fyri 2020:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 14 nýggjar verkætlanir av játtanini til Fiskivinnuroyndir 2020.
Harumframt er framhaldandi játtan latin 6 verkætlanum. Tvær av hesum verkætlanunum byrjaðu í 2018 og 4 byrjaðu í 2019, sí fylgiskjal 1.

**Tilsamans fáa sostatt 20 verkætlanir játtaðan stuðul í 2020-22. Tilsamans fáa hesar játtaðar 8,55 mió. kr., harav 6,31 mió. kr. eru fyri 2020, 1,65 mió. kr. fyri 2021 og 0,60 mió. kr. fyri 2022[2].**

28 nýggjar og 6 framhaldandi verkætlanir ella tilsamans 34 verkætlanir søktu upprunaliga um 20,5 mió. kr., harav 13,3 mió. kr. fyri 2020. Samlaða játtanin til Fiskivinnuroyndir fyri 2020 er 6,5 mió. kr. Hon varð lækkað úr 8,6 mió. kr. í 2017 við 1,4 mió. til 7, 2 mió. kr. fyri 2018 og í fjør varð hon lækkað við 0,7 mió. kr. afturat til 6,50 mió. fyri 2019. Sama er hent fyri 2020.
Í 2017 varð játtanin annars aftur hækkað við 5,1 mió. kr. til 8,6 mió. kr. og 2 ár frammanundan kom játtanin heilt niður á 2,208 mió. kr., men varð so seinni í 2016 hækkað við 1,3 mió. kr. til 3,508 mió. kr. Hetta skal síggjast í lutfalli til, at hon bara minkaði ár fyri

[1] Í tíðarskeiðinum frá 1. sept. 2013 til 3. sept. 2015 var samskiparin lagdur inn undir Aðalskrivstovuna v/ Rógva Reinert, aðalstjóra. Síðani er samskiparin aftur (eins og fyrr) lagdur inn undir Fiskivinnustovuna v/Andras Kristiansen, deildarstjóra.

[2] Restin av játtanini 193.000 kr. svarandi til 2,97 % av 6,5 mió. kr. er sett av til ymiskar útreiðslur hjá FVR (12. Framløgudag 24/2-2020, lýsingar vm.). Íroknað hesa upphædd eru 50 kkr. at brúka til eina verkætlan um sandmaðk, sum stýrið letur gera.

ár, til hon í 2015 varð lækkað aftur við 1,6 mió. kr. niður á 2,208 mió. kr., sum er tað lægsta hon hevur verið.




Í ár komu 28 nýggjar umsóknir inn, sum er tað sama talið sum í fjør, tá 28 nýggjar umsóknir komu (34 í 2018, 30 í 2017, 11 í 2016, 9 í 2015, 17 í 2014, 27 í 2013 og 32 í 2012). Talið av umsóknum er tað sama sum í fjør. Tað lækkaði eitt vet í 2019 móti at hava verið hækkandi fyri árini 2017 og 2018. Økingin varð hildin at hava samband við hækkaðu játtanina bæði i 2017 og 2018. Játtanin varð økt við 1,3 mió. kr. í 2016 og við heili 5,1 mió. kr. í 2017 (8,6), men so lækkað við 1,4 mió. kr. í 2018 (7,2). Hon varð aftur lækkað við 0,7 mió. kr. í 2019 (6,5). Og tað sama er hent fyri 2020.
Í 2015 var játtanin komin niður á 2,208 mió. kr. eftir lækkingum í nógv ár og støðan var vorðin hættislig. Ein kann tí frøast yvir at politiska skipanin – hóast lækkingarnar í 2018 og 2019/20 - hevur uppraðfest fiskivinnuroyndir, sum fevnir um fiskivinnugransking, -menning og –nýskapan.
**Ein lítil partur av játtanini hesa ferð 193.000 kr. (2,97%) er avsettur til ymiskar útreiðslur hjá FVR (12. Framløgudagurin verður 24/2-2020, lýsingar, fundarpening v.m.).** Íroknað hesa upphædd eru 50 kkr. at brúka til eina verkætlan um sandmaðk, sum stýrið letur gera.

Hóast nógvar umsóknir í ár 2020, so hava 20(16+4) av 34(28+6) fingið tilsøgn um stuðul. Hetta merkir, at knapt 59% ella nærum 3/5 av umsóknunum, sum søktu, fáa tilsøgn um stuðul. Í fjør var talið knapt 65% (24/37).

Í 2018 var úrslitið, at 26 umsóknir fingu tilsøgn um stuðul av 41umsóknum svarandi til gott 63% av umsóknunum. Í 2017 fingu 23 av 37 umsóknum játtaðan stuðul svarandi til 62% av umsóknunum. Í 2016 vóru fáar umsóknir, so nærum allar umsóknirnar ella góð 90% (14/15) fingu játtað stuðul. Í 2015 og 2014, tá upphæddirnar at søkja vóru í lægra lagi, fingu umleið

¾ av umsóknunum tilsøgn um stuðul. Árini frammanundan hevur tað verið millum helvt og tríggir fjórðingar av umsøkjarunum, sum hava fingið stuðul.

Tað er vert at leggja til merkis, at í ár er fíggjarstyrkurin væl hægri enn undanfarin ár – umleið 2/5 (39,3%)[3]. Seinastu árinini hevur hetta talið ligið á góðum ¼.
Vanliga siga vit, at tá talan er um størri eginfígging, er reiði peningurin ikki tann stóri, men heldur er talan um sum oftast "kapitaliseringar" av eginavriki, virðismettum eginavriki ella mettum virði, sum verður latið til verkætlanina. Hetta er ikki galdandi fyri allar verkætlanirnar longur. Í ár er bert ein privat "dýr" verkætlan, sum fær stuðul yvir 0,5 mió. kr., sum leggja nakað meira av kontantari fígging í verkætlanirnar, enn søkt varð um.
Mælt verður framhaldandi til, sum fyrr, at verkætlanarumsitarar og -leiðarar leggja seg meira eftir at leggja størri dent á at gera góða dokumentatión av eginavriki og mettum virðum í verkætlanunum (striltið gongur kortini við hesum). Ætlanin er at gera eina vegleiðing um eginfígging, kontant fígging og mett eginavrik. Onkur fígging kemur eisini uttanífrá, sjálvt um hesar aloftast ikki eru serliga stórar.

Umsóknirnar hava verið viðgjørdar eftir sama leisti sum undanfarin ár, og eru mannagongdirnar fyri viðgerðini lýstar á heimasíðuni www.fvg.fo.
Seinnu árini hevur dentur verið lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka meira í verkætlanum, og er hetta eydnast reiðiliga væl. Aftur í ár varð serligur dentur lagdur á at fáa verkætlanir innan ásettu og víðkaðu 3 høvuðsøkini (m.a. førleikamenning í øllum liðum, virðisvøkstur av fiskavørum, at fáa alt tilfeingið til lands, gagnnýtt og virðisøkt, at menna ymiskar góðsku-bólkar fyri ráfisk og góðskuváttanir, at menna burðardyggan fiskiskap (umsitingarætlanir v.m.), at marknaðaratgongd og marknaðarføring kunnu betrast, at størri virðisøking verður skapt í Føroyum í øllum liðum í vinnuni, og at føroyskir førleikar verða mentir í tøkni, veiði, framleiðslu, veitingum, tænastum og sølu v.m.). Ansað hevur verið eftir ikki at veita kappingaravlagandi stuðul.
Stýrislimir hava, tá teir hava mett seg ógegnigar, ikki luttikið í viðgerðini av umsókn/ umsóknum.

**Vinnan fær 76,0% av stuðlinum, sum er nakað tað sama sum árið fyri í 2019 (75,5%), og sum aftur er væl hægri enn í 2018 (63,8%). Í 2017 fekk vinnan (71,3%) og í 2016 eisini (76%). Vinnan var á einum væl lægri støði bæði í 2015 (58%) og 2014 (62%).**
Her má ein minnast til, at játtanin hækkaði fyrst við 1, 3 mió. kr. í 2016 seint á árinum (til 3,508 mió. kr.), og í 2017 hækkaði játtanin við heili 5,1 mió, kr, upp í 8,6 mió. kr fyri síðani at lækka við 1,4 mió. kr. niður í 7,2 mió. kr. fyri 2018, og aftur lækkað við 0,7 mió. kr. niður í 6,5 mió. kr. fyri 2019. Sama er so hent fyri 2020, nú játtanin aftur er 6,5 mió. kr.

Í ár hava vinnufyritøkur, sum sagt fingið 76,0% av stuðlinum, sum er tað sama sum í 2019 (75,5%), men væl hægri enn árið fyri í 2018 (63,8%). Í 2017 fekk vinnan (71,3%) og í 2016 eisini (76%). Vinnan var á einum væl lægri støði bæði í 2015 (58%) og 2014 (62%).
**Havstovan** hevur fingið 19,2%, sum er væl hægri enn árið fyri (í 2019 fekk Havstovan 11,5%. Í 2018 fekk Havstovan 21,6% og í 2017 19,1%). Burtursæð frá 2016 og 2019, tá

[3] Í 2019 (25,2%), í 2018 (25,2%), í 2017 (27,9%), í 2016 (23,7%), í 2015 (19,4%), í 2014 (32,2%), í 2013(31,8%), í 2012 (fyrra 28,9% og seinna 38,2%), 2011 (40,4%), í 2010 (41%), í 2009 (34%) og í 2008 góð (42%), sum var væl minni enn í 2007, tá søkt var um 2/3 frá FVR!

Havstovan fekk ávikavist12,1% og 11,5%, so hevur Havstovan sum oftast ligið væl hægri (28% í 2015, 28 % í 2014, 32% í 2013 og 26% í 2012).
**Aðrir almennir** granskingarstovnar enn Havstovan (Hagstova Føroya, Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, Fróðskaparsetrið v.m.) hava fingið 4,8%, sum er væl lægri enn árini frammanundan (13,0% í 2019, 13,9% í 2018, 8,7% í 2017, 12% í 2016, 14% í 2015). Talan er um stuðul til: Altjóða ráðstevnu um havrættarlig atlit í samband við fiskivinnu innan og uttan fyri 200 fjórðingar.

**Eingin PhD verkætlan** verður stuðlað í ár, men ein **Vinnugranskaraverkætlan,** sum byrjaði í fyrrárið (2018-20), helt uppat í ótíð, nærum beinanvegin. Eingin PostDoc-verkætlan verður stuðlað í ár.

Í grafiska yvirlitinum fyrikoma Granskingarkjarnurnar enn, men hesar vórðu niðurlagdar í september 2010[4]. Hetta uppbýtið av játtaðum stuðli hevur verið nýtt síðani 2004, og er tí hildið á fram við hesum býtinum. Hetta uppbýtið sæst aftur í myndunum eins og í stabba-myndunum á komandi síðunum. Hesaferð, eins og frammanundan, hava vit býtt stuðulin til almennar verkætlanir upp í tvey – stuðul til verkætlanir á Havstovuni og stuðul til verk-ætlanir á øðrum stovnum enn Havstovuni[5]:




[4] Tær báðar nýggju Granskingarkjarnurnar: Kjarnan fyri Veiði- og Reiðskapstøkni (við denti á at minka oljunýtsluna (orkusparing)) og Kjarnan fyri Framleiðslutøkni (við denti á framleiðslu og gagnnýtslu av allari hjávøru (biotøkni)) vórðu niðurlagdar í september 2010 í samband við, at játtanin til Granskingarætlanir á fíggjarlógini fyri 2011 fór at fella burtur. Frammanundan teimum 2 nýggju Granskingarkjarnunum vóru 3 Granskingarkjarnur (ein var eisini fyri veiðitøkni).
[5] Stuðul hevur verið latin til Havstovuna á hvørjum ári (2004-20) og Fróðskaparsetur Føroya/NVD (2007-08 + 2011-12 og 2014) og fyri 2020) og fyri 2012-16 eisini HFS. Fiskimálaráðið var eisini við í hesum bólki fyri 2015 (Verkætlanin: Virðisvøkstur í Fiskivinnuni) og í 2019 (WEFTA-ráðstevna í okt. 2019). Í 2016-18 var eisini Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (PhD) og Umhvørvisstovan 2016-17 við í yvirlitinum). Í 2018 og 2019 eru Hagstova Føroya og UVMR komin við. Stýrið fyri FVR fekk gjørt eina verkætlan í 2016, sum lýsti støðuna á ísfiski í Føroyum.

Ofta verður spurt, um hvat Havstovan fær frá Fiskivinnuroyndum (undir Fiskimálaráð-num), og um vinnan ikki fær í minna lagi? Niðanfyri sæst, hvussu játtanarbýtið hevur verið í meðal fyri øll árini 2004-20:




Sum tað sæst hevur vinnan í meðal fingið yvir helvtina 57% øll árini og í 2020 fær vinnan knapt 76,0% av játtanini.

**FVR: Samlað játtan og meðal játtanarbýtið árini 2004-20**

| Býtið 2004-20 í kr. | Samlað játtað 2004-20 | Einfalt meðal pr. ár | í procent |
|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 49.704.114 | 2.923.771 | 57,9% |
| PhD/V.gr./lesandi | 7.297.259 | 429.251 | 8,5% |
| Granskingarkjarnurnar | 3.544.750 | 208.515 | 4,1% |
| Havstovan | 20.815.626 | 1.224.449 | 24,3% |
| Aðrir alm. stovnar | 4.423.696 | 260.217 | 5,2% |
| Tilsamans | 85.785.445 | 5.046.203 | 100,0% |

Sum tað sæst av omanfyristandandi, hevur vinnan fingið í meðal góða helvt – 57,9 % - av stuðlinum øll árini 2004-20. Vinnan fær í ár 76,0%, í fjør 75,5%, í 2018 61,4 %, í 2017, 71,3% og í 2016 77,5%, sum eins og fyri í ár er tað hægsta nakrantíð. Í ár fær vinnan knapt 76,0% , sum er væl hægri enn meðal 57,9 %. Havstovan hevur øll árini fingið í meðal fjórðingin 24,3 %. Aðrir almennir stovnar enn Havstovan hava fingið í meðal 5,2 %. PhD-lesandi, Vinnugranskarar og lesandi hava fingið í meðal 8,5% og Granskingarkjarnurnar (ongin játtan síðani 2011) hava í einfaldum meðal fingið 4,1%.

Árligu játtanirnar í prosentum og tølum  eru (sí niðanfyri og á næstu síðu):




Aðrir almennir stovnar á talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS/FISK/Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu/Umhvørvisstovan/Hagstovan/UVMR))

Játtanarbýtið árini 2004-20 í prosentum

| Býtið í  procentum | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 41 | 48 | 44 | 39 | 40 | 63 | 45 | 54 | 60 | 58 | 62 | 57,5 | 75,9 | 71,3 | 61,4 | 75,5 | 76,0 |
| PhD og V.gr. | 0 | 8 | 16 | 23 | 25 | 12 | 25 | 8 | 9 | 0 | 1 | 0,0 | 6,8 | 3,5 | 6,6 | 0,0 | 0,0 |
| Granskingarkjarnurnar | 10 | 9 | 13 | 3 | 9 | 22 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Havstovan | 49 | 35 | 28 | 30 | 21 | 3 | 25 | 36 | 26 | 32 | 28 | 28,3 | 12,1 | 19,1 | 22,0 | 11,5 | 19,2 |
| Aðrir alm. stovnar | 0 | 0 | 0 | 5 | 5 | 0 | 0 | 2 | 5 | 10 | 9 | 14,1 | 5,2 | 6,1 | 10,1 | 13,0 | 4,8 |
| Tilsamans | 100 | 100 | 101 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100,0 |




Aðrir almennir stovnar á talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS/FISK/Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu/Umhvørvisstovan/Hagstovan/UVMR))

## Játtanarbýtið øll árini 2004-20

| Býtið 1.000 kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2.045 | 2.425 | 2.185 | 1.975 | 1.975 | 3.163 | 2.272 | 2.721 | 2.558 | 2.454 | 2.300 | 1.222 | 2.190 | 6.053 | 4.563 | 4.811 | 4.795 |
| PhD og V.gr. | - | 378 | 800 | 1.139 | 1.242 | 581 | 1.243 | 524 | 381 | - | 31 | - | 195 | 295 | 488 | - | - |
| Granskingarkjarnurnar | 481 | 450 | 641 | 150 | 460 | 1.118 | 245 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Havstovan | 2.454 | 1.772 | 1.377 | 1.480 | 1.064 | 140 | 1.241 | 1.659 | 1.096 | 1.356 | 1.021 | 601 | 350 | 1.621 | 1.635 | 735 | 1.213 |
| Aðrir alm. stovnar | - | - | - | 258 | 258 | - | - | 100 | 200 | 411 | 350 | 300 | 150 | 518 | 749 | 830 | 300 |
| Tilsamans | 4.980 | 5.025 | 5.003 | 5.002 | 4.999 | 5.001 | 5.001 | 5.004 | 4.235 | 4.221 | 3.703 | 2.123 | 2.885 | 8.487 | 7.437 | 6.376 | 6.307 |

Í 2013-17 var eingin vinnugranskaraverkætlan[6] stuðlað. Fyrrárið bleiv aftur ein vinnugranskaraverkætlan stuðlað (2018-20), men hendan gavst tíanverri í ótíð nærum beinanvegin í 2018. Mett varð í fjør, at fleiri vinnugranskaraverkætlanir fóru at vera komandi árini, men enn hevur hetta ikki víst seg at vera so. Seinasta vinnugranskara-verkætlanin var í 2012[7].
Vinnugranskaraskipanin hjá Fiskivinnuroyndum gevur virkjum møguleika at seta ein vinnu-granskara á virkinum í upp til 3 ár og fáa hann fíggjaðan við 50% upp til 300 kkr. um árið. Kravið er, at granskingarevnini[8] skulu hava støði í menningarætlanum hjá fyritøkuni, og at verkætlanin skal vera í samsvari við Programmið fyri Fiskivinnuroyndir.

[6] Serlig føroysk skipan sí www.fvg.fo (danska Erhvervs-PhD skipanin hevur higartil ikki verið galdandi fyri Føroyar, men VMR (v/Jóhan Dahl, landsstýrismanni) gjørdi fyri nøkrum árum síðani avtalu við danskar myndugleikar í 2014 um at fáa skipanina eisini at virka fyri Føroyar frameftir). Møguleiki er fyri at knýta eina vinnuverkætlan saman við einari vanligari PhD-verkætlan (tá vinnuvirkið gongur við til tað). Ymisku PhD-skipanirnar er øki hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo.
[7] PBP - Fra peptoner til Bioaktive Peptider – vinnugranskari (Atlantic Biotechnology). 1/5-09-30/4-12.
[8] (sí http://www.fvg.fo/Default.aspx?ID=14) .

Yvirlitið yvir samlaðu játtanina frá FVR 2020 og komandi árini (2021/22) er víst á fylgjandi tabellyvirliti:

| Samandráttur (kkr.): | 2019-21 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| **14 nýggjar verkætlanir hava fingið játtað (eftir tillaging/skerjing):** | **7.122** | **4.875** | **1.647** | **600** |
| Men hesar 14 søktu upprunaliga um: | 9.222 | 5.652 | 2.308 | 1.261 |
| **6 framhaldandi verkætlanir hava fingið játtað (lítil broyting):** | **1.432** | **1.432** | **0** | **0** |
| Og hesar 6 søktu upprunaliga um (broyting): | 1.512 | 1.512 | 0 | 0 |
| **Hesar 20 (14+6) verkætlanir fáa tilsamans játtað:** | **8.554** | **6.307** | **1.647** | **600** |
| 14 nýggjar verkætlanir hava ikki fingið játtað stuðul: | 9.725 | 6.132 | 2.593 | 1.000 |
| Allar 34(14+6+14) verkætlanirnar bóðu upprunaliga fyri 2020-22 um: | 20.458 | 13.295 | 4.902 | 2.261 |

Restin av játtanini 193.000 kr. svarandi til 2,97 % av 6,5 mió. kr. er sett av til ymiskar útreiðslur hjá FVR. (12. Framløgudagur 24/2-2020, lýsingar vm.). Íroknað hesa upphædd eru 50 kkr. at brúka til eina verkætlan um sandmaðk, sum stýrið letur gera.

Viðfest hesum skjali er:

- **Fylgiskjal 1:** Verkætlanir játtaðar 10. jan. 2020
- **Fylgiskjal 2:** Lidnar verkætlanir í 2019 (nakrar eru seinkaðar)
- **Programmið 2017-2020** (bæði stutta og langa) - broytingar gjørdar í 2017 eru vístar við gulum
- **Lýsingin 2020** (væntaða upphæddin 7,2 mió. kr. varð broytt til 6,5 mió. kr.)

## Fylgiskjal 1: Verkætlanir játtaðar 10. jan. 2020

| Mál nr. | Navn (stytt/langt) | | | Játtað 2020 | 2021 | 2022 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Nýggjar verkætlanir (14):** | | | **4.875.000** | **1.647.145** | **600.000** | |
| 19/00525 | Slímállur (/Súgállur) | RV/VØF | V | 300.000 | | | 2020 |
| 19/00632 | Altjóða ráðstevna um havrættarlig atlit í samband við fiskivinnu innan og uttan fyri 200 fjórðingar | BSMF/BF | A | 300.000 | | | 2020 |
| 19/00637 | Partroling við lemmum | RVF | V | 400.000 | | | 2020 |
| 19/00638 | Hávirking av sjópylsu í Føroyum til ymiskar marknaðir | RV/VØF | V | 225.000 | | | 2020 |
| 19/00640 | Marknaðarkanning fyri silda og makrel úrdráttir í Týsklandi og Hollandi 2020 | VØF/BSMF | V | 250.000 | | | 2020 |
| 19/00642 | Lættsaltaði IQF fløk til saltfiskamarknaðarnir í Evropa. LFE (Light salted fillets Europe) | VØF | V | 150.000 | 150.000 | | 2020-21 |
| 19/00643 | Ny filiteringsmaskine til hvidfisk med en samlet lænde på mellem 40-90 cm (0,8-5,5 kg med hoved og uden indvolde) | VØF | V | 900.000 | 400.000 | | 2020-21 |
| 19/00644 | Árstíðarbroytingar í útbreiðslu og nøgd av trimum sløgum av nebbasild og týdning teirra sum føði hjá toski á innaru leiðum | BF | H | 500.000 | 300.000 | | 2020-21 |
| 19/00645 | Leikluturin hjá djóraæti í atferð hjá norðhavssild | BSMF | H | 400.000 | 97.145 | | 2020-21 |
| 19/00650 | Viðurskiftir, sum ávirka rávørugóðskuna á uppsjóvarfiski, sum skal framleiðast á Varðin Pelagic | BSMF | V | 350.000 | 350.000 | 350.000 | 2020-22 |
| 19/00670 | Stovnan av felagsskapi at taka sær av burðardygd í føroyskari fiskivinnu | BF/VØF | V | 200.000 | 100.000 | | 2020-21 |
| 19/00653 | Menning av millummarknaði fyri makrel og sild | VØF | V | 500.000 | | | 2020 |
| 19/00647 | Application of environmental DNA monitoring for describing stock fluctuations and commercially important demersal fish in Faroese waters | BF | H | 250.000 | 250.000 | 250.000 | 2020-22 |
| 19/00649 | Ber til at tynna stovnin, tá nógv er til, og fáa meira burturúr í longdini og samstundis økja tilgongdina til toskastovnin | BSMF/BF | V | 150.000 | - | - | 2020-22 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Framhaldandi verkætlanir (6)** | | | **1.432.000** | **0** | **0** | |
| **18/00578** | Royndir at veiða við langdorg (horisontal snella) | RV/VØF | V | 137.500 | | | 2019-(20) |
| **18/00652** | Assessing the recovery of Haddock, Saithe and Cod on the Faroe Bank using environmental DNA | BF | H | 62.500 | | | 2019-(20) |
| **18/00665** | Menning av sjálvlýsandi teymum | RV/VØF | V | 250.000 | | | 2019-20 |
| **18/00674** | Alt í land. 2. stig | RV/VØF | V | 382.000 | | | 2019-20 |
| **17/00593** | Virðisøking av upsa. (Paneraðar og vacuumpakkaðar upsavørur) | VØF | V | 200.000 | | | 2019-(20) |
| **17/00608** | At bjóða føroyskar fiskavørur til danska marknaðin, har dygdin er í heimsklassa. Hágóðskufiskavørur til kræsnar kundar. | VØF | V | 400.000 | | | 2018-20 |
| | **Verkætlanir tilsamans (14+6):** | | | **6.307.000** | **1.647.145** | **600.000** | |

Til ymiskt (12. Framløgudag 24/2-2020, lýsingar vm.) er avsett 193.000 kr., svarandi til 2,97% av 6,5 mió. kr. Íroknað hesa upphædd eru 50 kkr. at brúka til eina verkætlan um sandmaðk, sum stýrið letur gera.

Styttingar:

BF: Burðardyggur fiskiskapur
RV/VØF ella RVF: Royndarveiða og virðisøking av fiski
BSMF: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
Vgr: Vinnugranskaraverkætlan
PhD: PhD-verkætlanir.
pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)
V: Vinnuverkætlanir,
H: Havstovan
A: Almenn verkætlan, sum ikki er Havstovan

## Fylgiskjal 2: Lidnar verkætlanir í 2019 (nakrar eru seinkaðar)

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Lidnar verkætlanir í 2019:** | | | | | | |
| **Mál nr.** | | **Heiti á verkætlanini** | **Øki** | **Umsøkjari** | **Verkætlanar- -leiðari** | **Játtaður stuðul í 1000 kr.** | | |
| | | | | | | **2017** | **2018** | **2019** |
| | | **Lidnar verkætlanir frá 2017 (tvær):** | | | | | | |
| 16/00632 | | Kudoa í makreli | RVF/BF | Eilif Gaard, Havstovan | Dánjal Petur Højgaard | 377 | 438 | 210 |
| 16/00645 | | Marknaðarkanningar í Kina | BSMF | Jóhanna Magnusardóttir | Dávid Fossdalsá | 276 | 285 | 138 |
| | | **Lidnar verkætlanir frá 2018 (5):** | | | | | | |
| 17/00571 | | Marknaðarkanningar og marknaðarføring av norðhavs-, fjarðasild og brislingi saman við Sp/f Tavuni, Leirvík | VØF/ BSMF | Tavan | Johan Mortensen | | 200 | 200 |
| 17/00580 | | Marknaðarkanningar fyri turrar vørur úr havinum til Human Consumption og Pet Food | VØF/ BSMF | Faroe Marine Products (FMP) | Magnus Pauli Glerfoss | | 200 | 200 |
| 17/00583 | | Kortlegging av brislingi á Skálafjørðinum - útbreiðsla og grundleggjandi lívfrøði gjøgnum árið | BF | Havstovan v/Eilif Gaard | Eydna í Homrum | | 250 | 140 |
| 17/00609 | | Fiskiveiðidatavøruhús (forverkætlan ). | BSMF | Hagstova Føroya | Bergur P. Dam | | 255 | 355 |
| 17/00644 | | Kanning av føroyska taskukrabbastovninum (*Cancer pagurus*) | (RV)/BF | Biofar v/Ámundur Nolsø | Jógvan Fróði Hansen | | 228 | 228 |
| | | **Lidnar verkætlanir frá 2019 (10):** | | | | | | |
| 18/00641 | | Menning av maskinu til uggabeinsskering | VØF/ BSF | P/F Fiskavirkið | Jákup Poulsen | | | 400 |
| 18/00642 | | Hotwings | VØF/ BSMF | P/F Fiskavirkið | Jákup Poulsen | | | 150 |
| 18/00651 | | Reyðkrabbi í føroyskum sjóøki | BF | Deep C Fishing Sp/F | Deep C Fishing Sp/F | | | 300 |
| 18/00663 | | Kanning av sensorisku góðskuni á ísfiski | RVF/ BSMF | Granskingarsetrið iNOVA | Janus Vang | | | 100 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18/00666 | | Atburður hjá flatfiski í mun til tosk á landleiðini | BF | Skálafossur Sp/f | Bjarni í Skálum | | | 100 |
| 18/00669 | | Menning av línuskipan, sum kann lyfta línuna upp frá havbotninum | RV | J.K.Joensen & Sonur | Agnar Joensen | | | 200 |
| 18/00671 | | Hávirka sjópylsu í Føroyum til marknaðir , har íð kinverjar búgva | RV/VØF | Norðurrás Sp/f | Marni G. Simonsen | | | 250 |
| 18/00675 | | WEFTA 2019 (West European Fish Technology Association) í FO 15-17. okt. 2019 www.wefta2019.com | VØF/ BSMSF | FVR/Jákup Mørkøre | Jákup Mørkøre | | | 300 |
| 18/00676 | | "The Pure Taste of the Faroe Islands" - Átta nýggjr matgerðarfilmir til www.FaroeSeafood.com | VØF/ BSMF | UVMR v/Herálvur Joensen | Páll Nolsøe | | | 175 |
| 18/00677 | | Selective fishing við línu | RV/VØF | M/B Slætnatindur FD1053 - Sp/ US | Sjúrður L. Ejdesgaard | | | 145 |
| | | **Lidnar verkætlanir (2+5+10=17):** | | | 6.099 | **653** | **1.856** | **3.591** |

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Uppsteðgað verkætlan í 2019 (Ikki søkt framhald 2020):** | | | | | | | |
| | | **Uppsteðgað** | | | | **2019** | **2020** | **2021** | |
| 18/00658 | 6 | Góðskueftirlit, QC | VØF | Visulect ÍVF | Páll Fargraberg | 200 | 100 | | 2019(20) |
| | | **Uppsteðgað (1) í 2019** | | | | **200** | **100** | **-** | |

Styttingar:

BF: Burðardyggur fiskiskapur
RV/VØF ella RVF: Royndarveiða og virðisøking av fiski
BSMF: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
Vgr: Vinnugranskaraverkætlan
PhD: PhD-verkætlanir.
pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)
V: Vinnuverkætlanir,
H: Havstovan
A: Almenn verkætlan, sum ikki er Havstovan

**Programm 2017-2020**

**Stutta:**

**Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum**
**Burðardyggur fiskiskapur**
**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum**

**Longra:Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:
1. royndarveiða eftir fiskasløgum, sum ikki verða gagnnýtt
2. at fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir
3. **at alt tilfeingið verður fingið til lands, verður gagnnýtt og virðisøkt**
4. at menna tøkni og mannagongdir, ið betra um góðskuna á fiski og fiskavørum
5. **at menna ymiskar góðskubólkar fyri ráfisk og góðskuváttanir**
6. at lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar
7. fáa fram og nýta eginleikar sum havtilfeingið hevur á fólkaheilsuna

**Burðardyggur fiskiskapur**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:
- at menna tøkni, ið fer varliga við umhvørvinum og minkar um orkunýtsluna
- at menna vitanina um fiskalívfrøði og vistfrøði
- at menna burðardyggan fiskiskap (umsitingarætlanir v.m.)

**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum**

Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum, t.d.:
- tilfeingisbúskapur og fyrisiting
- skipan av framtíðar fiskiskapi og flota undir Føroyum (íroknað ávirkan á onnur lið)
- marknaðarføringsátøk[9], ið kunnu stimbra áhugan fyri føroyskum fiski, herundir á nýggjum marknaðum.
- at marknaðaratgongd og marknaðarføring kunnu betrast
- at størri virðisøking verður skapt í Føroyum í øllum liðum í vinnuni
- at føroyskir førleikar verða mentir í tøkni, veiði, framleiðslu, veitingum, tænastum og sølu

[9]Tó ikki sølumessur

**Fiskivinnuroyndir 2020**

**Lýsing eftir umsóknum**

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum

Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:

- Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum
- Burðardyggur fiskiskapur
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum

Serligur dentur verður lagdur á, at:

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging, onnur fígging og samfígging er skjalfest
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Fiskivinnuroyndir kann í hesum umfari væntandi útluta 7,2 mió. kr. komandi ár til nýggjar og verandi verkætlanir.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[10].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **mánadagin 2. desember 201i9, kl. 12:00.**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2020.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

[10] max. 300 kkr./ár í 3 ár

**Lýsing eftir umsóknum**

# FISKIVINNUROYNDIR **2020**

**Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum til tess at stuðla praktiskum, vinnuligum og vísindaligum royndum og kanningum, ið menna og økja um framleidnið í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.**

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Royndarveiða og virðisøking av fiski og fiskavørum
- Burðardyggur fiskiskapur
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni og førleikamenning í øllum liðum

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- Vinnan tekur lut í verkætlanini
- Eginfígging, onnur fígging og samfígging er skjalfest
- Samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- At verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Fiskivinnuroyndir kann væntandi í hesum umfari útluta 7,2 mió. kr. komandi ár til nýggjar og verandi verkætlanir.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%.(max. 300.000 kr. um árið í 3 ár).

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum. Tel. 35 30 30 / fartel. 55 32 48 ella til jakupmo@fisk.fo

**Umsóknarfreistin er mánadagin 2. desember 2019, kl. 12.00.**

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

**Meira fæst at vita:**

Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara **www.fvg.fo**

Fiskimálaráðið

FISKIVINNUGRANSKING

*Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2020.*